Stutt vegleiðing og samanumtøka til synopsu roynd hjá 8. flokki (10.06.2025)

- Eina viku frammanundan hava tit framleitt eina *framløgu ætlan um eitt sjálvvalt evni*, ið tit skulu leggja fram sum tað allarfyrsta tá tit koma inn í royndina.

- *Pensum listin* (síðurnar tit skulu lesa úr samfelagsfrøði bókini) er útflýggjaður eina viku frammanundan. Tit hava øll fingið hann sum pappír, men um tit hava mist hann burtur, so er hann á heimasíðuni hjá Meginskúlanum undir "Heimasetningur".

- Har eru <u>tveir</u> partar í tykkara **<u>synopsu roynd í samfelagsfrøði</u>**.

    - **Fyrri parturin** er framløga tykkara um tykkara sjálvvalda evni.
      Hesin parturin varar í uml. 6-8 minuttir.

    - **Seinni parturin** er ein samtala við støði í próvtøkuspurningur í kendum tilfari (pensum). Hendan spurning trekkja tit á staðnum eftir at tit hava lagt tykkara sjálvvalda evni fram og samtalan snýr seg síðan um eitthvørt evni, ið tit hava lisið um úr pensumlistanum.
      Tit sleppa ikki at trekkja ein spurning, ið er í sama yvirskipaða evni, sum tit hava valt til sjálvalt evni. Tvs. hava tit um politikk, so fáa tit ein spurning í sosiologi. Hava tit um sosiologi, so fáa tit ein um politikk. (*Búskapur er ikki pensum fyrrenn í 9. flokki. Tískil, um onkur hevur valt búskap sum yvirskipaða evni, so ber til at fáa spurningar í bæði politikki ella sosiologi*)
      <u>Tit fáa onga fyrireiking til hendan partin og tí er tað týdningarmikið at tit lesa væl og virðiliga, áðrenn tit koma inn.</u>
      Hesin partur varar í uml. 5-7 minuttir.

    - **Øll royndin** tilsamans varar 20 minuttir. Próvdøming (karaktergeving) íroknað.

- Týsdagin 10.06 koma tit inn á Meginskúlan til munnliga roynd í samfelagsfrøði. Øll fáa eitt serstakt klokkuslett at møta. Hettar klokkuslettið er tíðin tú skal inn. Møtið tí eitt sindur fyrr, so tit eru klár.

- Tit hava loyvi at hava sjálva framløguætlanina við inn í royndarhølið og kunnu hyggja at henni fyri at halda skil á raðfylgju og hvat tit skulu tosa um. Tað **<u>er</u>** lov at taka onnur ting við í tykkara framløgu, sum ikki standa serskild á framløguætlanini frammanundan - so leingi tey eru viðkomandi!
- Eisini hava tit loyvi at skriva **<u>notatir og stikkorð</u>** við til tykkara framløgu í sjálvaldum evni, at styðja tykkum til, men tit skulu ikki lesa upp!
- **Eitt gott ráð** er at venja framløguna áðrenn, helst nógvar ferðirnar, so hon situr væl og virðiliga. Helst skulu tit eisini taka tíð, fyri at tryggja tykkum at framløgan ikki er ov stutt.

Tíðarætlan:

Munnlig roynd í 8. flokkur í samfelagsfrøði

08.00:	Elia
08.20:	Elly
08.40:	Enok
09.00:	Fróði
09.20:	Herman
09.40:	Hjalti
10.00:	Jonhild
10.20:	Karstin
10.40:	Kristina
11.00:	Lilja

Steðgur

11.30:	Marjun
11.50:	Rian
12.10:	Rita
12.30:	Rógvi
12.50:	Sarita
13.00:	Sólbjørn
13.20:	Teodora
13.40:	Tormóður